# Kjak



**Fríðleif Lydersen**
*guðfrøðingur*

# Lættari at gerast pávi í Rom, enn prestur í Føroyum

Í løtuni er sum kunnugt ikki møguligt hjá guðfrøðingum, sum hava útbúgvið seg aðra staðni enn í Danmark, at fáa starv í sokallaðu Føroysku Fólkakirkjuni. Í løtuni er lættari at gerast pávi í Rom, enn at gerast prestur í Føroysku Fólkakirkjuni. Ein nýtist bert at fara yvir til katólska trúgv, so hevur ein møguleika at gerast pávi. Ikki tí, eg havi ongar ætlanir um at gerast katolikur. Eg havi altíð ætlað mær at gerast prestur í Føroysku Fólkakirkjuni, men við núverandi lóggávu er hetta tíverri ógjørligt. Tí kann eg siga, at tað er lættari at gerast pávi í Rom, enn at gerast prestur í Føroysku Fólkakirkjuni.

Eg skilji ikki, at tað var neyðugt at yvirtaka kirkjuna, tá ið tað einasta, sum hent er, er at nakrar danskar lógir eru týddar til føroyskt. Tá ið kirkjan í skundi varð yvirtikin, so varð sagt, at lóggávan skuldi fáast upp á pláss áðrenn 2 ár vóru liðin. Eingin prestur varð settur í fast starv fyrr enn góð 2 ár eftir yvirtøkuna. Í góð 2 ár livdu kirkjulið í óvissu, ein ótolandi støða, ið ikki kann bjóðast fólki.

Nú síggja vit, at tað er torført at manna ávís størv, so nú er tíð upp á at rannsaka seg sjálvan, sum Jógvan bispur sigur. Eg vil takka Jógvani bispi fyri, at hann alla tíðina, síðani hann fekk at vita um støðuna hjá okkum, sum hava útbúgvið okkum uttan fyri Danmark, hevur verið sera jaligur at tosa við. Prestastarvið í Leirum í Hvalba hevur nú verið lýst leyst tvær ferðir, men ongin er enn settur í hetta starvið, ein ótolandi støða fyri kirkjuliðini.

Eg haldi, at politiski myndugleikin eigur at ganga í seg sjálvan og vísa kirkjuni og limum tess størri virðing. Eg havi stríðst við hetta málið, síðani eg gjørdist varugur við, at lóggávan forðaði mær í at gerast prestur í Føroyum. Eg havi fleiri ferðir skrivað til Føroya Løgting, Menatmálaráðið og løgtingslimirnar, men tað eru tey fæstu, sum hava hirt at svara mær. Tey, sum hava svarað skulu hava takk, men tað er ikki hent tað stóra kortini.

Tá ið fólk fyrst hava búsett seg uttanlands, so er ikki sikkurt, at tað er so stórur áhugi fyri at koma heimaftur seinni. Eg fari tí at heita á føroysku politikararnar um at gera tað soleiðis, at tað í framtíðini kann gerast møguligt at gerast prestur í Føroyum, sjálvt um ein ikki hevur danska guðfrøðisútbúgving. Tí, sum eg fyrr havi sagt, so kann tað vera jaligt fyri føroyskt kirkjulív og gera, at størv ikki standa ósett. Vónandi verður skjótt lættari at gerast prestur í Føroysku Fólkakirkjuni enn at gerast pávi í Rom. Ikki av ólmussu, men tí, at kirkjan kann fáa lut í virðismiklum kunnleika, sum kann vera við til, at ríka um kirkjuna.



**Sjúrður Skaale**

# Nú rýkur illa úr Uttanríkisráðnum

*Bæði Dimma og Sosialurin hava borið søgur, sum gera, at ein herskin roykur av korruptión stendur út úr Uttanríkisráðnum*

Ein politikari er sum ein vøra í einum stórum handli. Men fólk sleppa bara til handils fjórða hvørt ár, og tey kunnu bara keypa eina vøru. Bara ein persónur kann fáa krossin.

Tí má vøran marknaðarførast. Og tað verður, sum alt annað, gjørt gjøgnum miðlarnar.

Tí gera summir politikarar nógv fyri at fáa umrøðu í miðlunum.

Og eg skal ikki látast at vera meira katólskur enn pávin. Eg veit væl, at Jørgen Niclasen ikki er einasti politikari, sum roynir at ávirka fjølmiðlaumrøðuna av sær sjálvum.

Eg havi sjálvur verið "ghost-writer" (skuldu vit kalla tað "loyniskrivari"?) fyri nógvar politikarar.

Øll vita jú eisini, at Edmund Joensen hevur ein journalist í føstum starvi, sum skrivar lesarabrøv fyri hann.

Og øll vita, at Heðin Mortensen hevur rindað fólki úr kommukassanum fyri at skriva lesarabrøv fyri seg. Bæði nøvn á journalistunum og prísurin hava staðið í Dimmu.

## Eg rindaði sjálvur

Eg skipaði einaferð fyri studentadegi, tá eg var á Fólkatingi. Og tá rindaði eg, við almennum pengum, ferðaseðilin fyri tveir føroyskar journalistar, so teir kundu koma niður at senda beinleiðis frá tiltakinum.

Endamálið við studentadegnum var upplýsing og dialogur. Føroysk lesandi skuldu koma beinleiðis á tal við leiðandi danskar politikarar. Tí var útvarping viðkomandi - og tí varð tað eisini góðkent av grannskoðanini á fólkatingi.

Men hóast fólkatingsmaðurin ikki var í fokus í




***Passar tað um Sosialurin skrivar, so kemst illa uttanum, at Jørgen Niclasen, fyri almennar pengar, hevur roynt at keypt sær positiva umrøðu frá Miðlahúsinum!***

sendingini, so skerst ikki burtur at hann eisini, umenn óbeinleiðis, fekk eina ávísa umrøðu.

So markið er flótandi. Eingin ivi um tað.

Men tað er heldur eingin ivi um, at Jørgen Niclasen er farin út um mark!

## Ein gávumildur Jørgen

Eftir at Dimma avdúkaði, at Uttanríkisráðið hevur boðið Kringvarpinum til Brússel, spurdi eg Jørgen Niclasen nærri um hetta. Ein spurningur var, um uttanríkisráðið nakrantíð áður hevur boðið sær til at rindað fyri fjølmiðlafólk í samband við ferðir ella líknandi, og, um svarið var játtandi, hvørjar fjølmiðlar, og hvørji tiltøk, talan hevur verið um.

Svarið kemur í seinasta lagi um eina viku - men longu nú er greitt, at Jørgen áður HEVUR roynt at lokka journalistar at gera innsløg um seg.

Sosialurin skrivar nevniliga soleiðis í oddagrein leygardagin: "Allar ávaringarlampur á redaktiónini í Miðlahúsinum lýstu reytt, tá ein journalistur í Miðlahúsinum greiddi frá, at uttanríkisráðharrin hevði boðið viðkomandi á ferð til Washington saman við sær".

## Persónlig innbjóðing

Sambært hesum hevur Jørgen Niclasen altso ikki bara boðið einum fjølmiðli við sær á ferð til USA. Tað hevði verið nóg ringt. Men Jørgen er farin víðari, og hevur givið einum ávísum, útvaldum journalisti eina PERSÓNLIGA innbjóðing!

Journalistar eru ikki væl løntir í Føroyum. Men krøvini, sum verða sett til teirra framleiðslu, eru sera stór. Og stundum man vera langt millum tær heilt spennandi uppgávurnar.

Tí er eingin ivi um, at ein journalistur, sum verður boðin til USA upp á landsins besta, verður freistaður.

Tað er heldur eingin ivi um, at journalisturin, hevði hann tikið av tilboðnum frá Jørgeni, so ella so hevði kent, at hann kom í skuld til Jørgen. Og tað hevði uttan iva sæst aftur í innsløgunum.

Tað hevði jú eisini verið meira enn trupult at verið kritiskur móti einum manni, sum hevði boðið tær við sær á ferð til USA...

Passar tað um Sosialurin skrivar, so kemst illa uttanum, at Jørgen Niclasen, fyri almennar pengar, hevur roynt at keypt sær positiva umrøðu frá Miðlahúsinum!

## Luktar av korruptión

Korruptión er ein stórur trupulleiki í nógvum londum. Korruptión merkir, at embætisfólk ella onnur álitisfólk í loyndum fáa onkran ágóða fyri antin at gera okkurt, ella fyri at lata vera við at gera okkurt.

Tað, sum skal gerast, kann vera so nógv. Tað kundi t.d. verið tíðindainnsløg...

Ein ágóði kann eisini vera so nógv. Tað kundi t.d. verið ein spennandi túrur til USA...

Um fáar dagar kemur svarið frá uttanríkisráðharranum. Og tað er at vóna, at hetta svar kveistrar burtur allan illgruna um eina atferð, sum leggur seg tætt at tí, vit nevna korruptión.